
















Dygd
og fjølbroytni

Teymar er ein fjølbroyttur handil, ið hevur alt frá útgerð og klæðum til sjómannin og arbeiðsmannin til ullint pløgg og frítíðarklæði til hennara, hansara og børnini.



**Teymar**
Stoksoyrarvegur 2
700 Klaksvík

**Berglon**
Heiðavegur 9-11
620 Runavík

TEYMAR

SENDISTOVAN


# Stórt dansibrak í Ítróttarhøllini



*Teir eru kendir um alt landið fyri sínar góðu og gomlu "slagarar". Eyðun & Terji duga rættiliga at fáa lív í eina mannamúgvu*



*Jens Marni er kendur fyri sínar dygdir á tónlistarliga økinum. Faktor 4 við Jens Marna fara eisini at seta sín dám á stóra dansikvøldið í Runavík*

**Fyritreytirnar fyri einum góðum dansikvøldi kunnu neyvan verða nógv betri, enn tá Eyðun & Terji og Faktor 4 við Jens Marna fara á pall í Ítróttarhøllini í Runavík leygarkvøldið í næstu viku**

Leygarkvøldið 25. oktober verður aftur tiltikna dansikvøldið í Ítróttarhøllini í Runavík.

Tað er mentanarvikan, sum skipar fyri hesum kvøldi, og fyrireikararnir eru onga løtu í iva um, at hetta verður eitt kvøld, sum er vert at leggja av til hugnaliga samveru saman við góðum vinfólkum – í góðum dansi.

Hetta kvøldið verður eitt rættiligt dansibrak, sum tey í Runavík taka til. Soleiðis hevur verið undanfarin ár, og minni verður kvøldið ikki hesaferð.

- Flestu av okkum kenna góðu, gomlu slagararnar hjá Eyðuni & Terja, sum hava fingið okkum at svinga, dansa og syngja við í fleiri enn 20 ár. Flestu vita eisini, at Faktor 4 við Jens Marna borgar fyri góðsku.

So avgjørdir eru fyrireikararnir av hesum kvøldi.

### Endabrestur

Hetta tiltak kann roknast sum endabresturin av mentanarvikuni 2008 fyri tey ungu og vaksnu.

- Eftir eina røð av listaframsýningum, konsertum og øðrum framsýningum gjøgnum alla vikuna, er hetta óivað eitt gott høvi at sleppa út at hoyra góðan dansitónleik eitt leygarkvøld.

Fyrireikararnir siga, at dansurin í Ítróttarhøllini í Runavík byrjar á midnátt og endar klokkan 04.

Atgongumerki fáast við dyrnar, og kostnaðurin verður 180 krónur.

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

# Framløga í Eik Banka



*Áhugaverd framløga verður í Eik Banka mánakvøldið*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Mánakvøldið 20. oktober klokkan 20 skipar Eik Banki, sum er høvuðsstuðul hjá mentanarvikuni og Faroexpo, fyri almennari framløgu í Eik Banka í Saltangará.

Sverri Justinussen, sum starvast hjá Eik Markets, sigur frá um altjóða fíggjarstøðuna, og hvørja ávirkan hon kann hava á okkum í Føroyum.

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*